LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 18. juni 2025
J. nr.: 25/14160-2
Viðgjørt: GMN

**Svar upp á**
**skrivligan fyrispurning nr. 52-106/2024 eftir § 52 a í Tingskipanini til Bjarna K. Petersen, landsstýrismann frá Magnusi Rasmussen, løgtingsmanni, um arbeiðs- og uppihaldsloyvi**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Hvussu nógv nýggj arbeiðs- og uppihaldsloyvi eru givin higartil í 2025?
2. Hvussu nógv arbeiðs- og uppihaldsloyvi eru endurnýggjað í 2025?
3. Hvussu eru hesi tøl, sammett við trý tey seinastu árini?
4. Verða allar umsóknirnar viðgjørdar líka skjótt, sum áðrenn avgerðarmyndugleikin kom á føroyskar hendur, t.e. sum eftir Fast–Track skipanini?
5. Um ikki, hvørjar eru so orsakirnar, og hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera fyri at fáa umsóknirnar viðgjørdar líka skjótt, sum áðrenn avgerðarmyndugleikin kom á føroyskar hendur?

**Svar**

**Til nr. 1**

Tað eru givin 563 arbeiðs- og uppihaldsloyvi í ár fram til 16. juni (296 í 1. ársfjórðingi og 267 í 2. ársfjórðingi til 16. juni). Tølini viðvíkja arbeiðsloyvum og ikki familjusameining. Tølini umfata ikki afturferðaloyvi, góðkenningar av arbeiðsgevara eftir fast-track avtaluni ella undangóðkenning til ES-skipanina.

**Til nr. 2**

Tað eru framlongd 42 arbeiðsloyvir í ár (24 í 1. ársfjórðingi og 18 í 2. ársfjóðringi til 16. juni). Sum nevnt omanfyri viðvíkja tølini arbeiðsloyvum og ikki familjusameining.

**Til nr. 3**

1. september 2024 yvirtók Útlendingastovan avgerðarmyndugleikan í flestum málum á útlendingaøkinum. Umsóknir, sum vóru latnar inn áðrenn 1. september 2024, verða tó viðgjørdar av SIRI – Styrelsen for International Rekruttering og Integration, meðan mál, sum verða latin inn eftir 1. september 2024, verða viðgjørd av Útlendingastovuni.

Tølini eru tikin úr málsviðgerðarskipanini hjá Útlendingastovuni. Talan er sostatt ikki um ein hagtalsbanka, men eina málsviðgerðarskipan, og tí má fyrivarni takast fyri, at tað kunnu koma ávísir skeivleikar fyri.
Tølini viðvíkjandi arbeiðsloyvum seinastu trý árini eru hesi:

SIRI – Styrelsen for International Rekruttering og Integration

| 2022 | Tils. |
|---|---|
| *Upprunaloyvi* | 1653 |
| *Framleingjan* | 572 |
| | **2225** |

| 2023 | Tils. |
|---|---|
| *Upprunaloyvi* | 1286 |
| *Framleingjan* | 766 |
| | **2052** |

| 2024 | Tils. |
|---|---|
| *Upprunaloyvi* | 921 |
| *Framleingjan* | 772 |
| | **1693** |

| 2025, pr. 7/4 | Tils. |
|---|---|
| *Upprunaloyvi* | 2 |
| *Framleingjan* | 14 |
| | **16** |

Útlendingastovan (yvirtók mál 1. september 2024)

| 2024 | Tils. |
|---|---|
| *Upprunaloyvi* | 200 |
| *Framleingjan* | 38 |
| | **238** |

| 2025, pr. 16/6 | Tils. |
|---|---|
| *Upprunaloyvi* | 563 |
| *Framleingjan* | 39 |
| | **602** |

**Til nr. 4**

*Málsviðgerðartíð*

**Upprunaloyvir, miðal viðgerðartíð, fyri tíðarskeiðið 1. ársfj. 2025:**

Mál eftir Fast Track-avtaluni: 47 dagar

Mál eftir ES-lógini: 31 dagar

Fyri mál eftir ítróttaravtaluni: 21 dagar

Væntaða málsviðgerðartíðin fyri mál eftir Fast Track-avtaluni, mál eftir ES-lógini og mál eftir ítróttaravtaluni, er 30 dagar. Tølini vísa, at mál eftir Fast Track-avtaluni hava í miðal tikið 47 dagar at avgreiða í 1. ársfjórðingi í 2025. Meðan tað eftir ES-lógini og ítróttaravtaluni er ávikavíst 31 og 21 dagar.

Sostatt er tað serliga mál eftir Fast Track-avtaluni, ið taka longri tíð enn upplýst frammanundan. Ávísar grundir kunnu vera fyri hesum, eitt nú at upplýsingar mangla á júst hesum málinum.

Staðfestast má, at vanliga málsviðgerðin á arbeiðsøkinum tekur longri tíð enn ynskiligt, og at hetta kann hava neiligar avleiðingar fyri borgarar og aðrar viðkomandi partar.

**Til nr. 5**

Orsøkin til longu viðgerðartíðina er samansett. Økið er nýtt og framvegis undir uppbygging – bæði fakliga og skipanarliga. Hetta inniber, at tað er neyðugt hjá Útlendingastovuni at menna

mannagongdir, málsviðgerðarskipanir og fakligar førleikar, samstundis sum sjálv málsviðgerðin fer fram. Hetta ger arbeiðsgongdina meira tíðarkrevjandi í byrjanini.

Stovnurin er harumframt lítil og hevur ikki møguleika at gagnnýta teir fyrimunir, ið størri eindir hava – so sum journaleindir, móttøkueindir, uppbýtta málsviðgerð og automatiseraðar skipanir, sum eru tøkar í størri fyrisitingum, t.d. hjá SIRI og Udlændingestyrelsen.

Tað ber heldur ikki til at samanbera málsviðgerðartíðirnar beinleiðis, tí málini hjá Útlendingastovuni hava vanliga eina longri og meira samansetta málsgongd enn málini hjá teimum donsku myndugleikunum.

Áðrenn yvirtøkuna var uppgávan hjá Útlendingastovuni at upplýsa og lata eitt tilmæli ella frámæli í málinum, meðan endaliga avgerðin varð tikin aðrastaðni. Eftir at málsviðgerðin varð flutt heim, liggur alt viðgerðararbeiðið nú hjá stovninum. Hetta merkir í praksis, at Útlendingastovan í hvørjum einstøkum máli skal útinna alla málsviðgerðina, og samstundis – tvær ferðir í hvørjum máli – senda eitt bindandi tilmæli til antin SIRI ella Udlændingestyrelsen, áðrenn ein endalig avgerð kann verða latin viðkomandi pørtum. Hetta ger málsviðgerðina meira drúgva.

Útlendingastovan arbeiðir miðvíst við at styrkja innanhýsis skipanir, tryggja betri yvirlit yvir málsbyrðu og málsstøðu, og at menna fakligu førleikarnar á økinum. Hóast royndir at effektivisera arbeiðið, er tað vorðið meira greitt, at ein meira varandi og haldfør loysn má til.

Landsstýrismaðurin arbeiðir tí við at finna út av, hvørjar ítøkiligar loysnir skulu til, fyri at økið framhaldandi verður ment, og viðgerðartíðir styttar.